# Elspa á danska landsliðnum

Elspa Mørkøre er nú úttikin til danska svimjilandsliðið. Dimmalætting skrivaði fríggjadagin, at Elspa í farnu viku fekk bræv frá danska svimjisambandinum, og har varð sagt, at tíðin hjá henni í 50 metra rygg var nóg góð danska landsliðið. Elspa svam teinin í 29,67 sekundum. Elspa gjørdi í vetur av at flyta til Danmarkar, so hon kundi royna at vinna seg á danska landsliðið. Hon svimur fyri West Swim í Esbjerg.



# Aftur tap til Hødd

Hødd spældi á útivølli ímóti gamla felagnum hjá Kurt Mørkøre, Sogndal í gjár. Og aftur fór Hødd av vøllinum við ongum. Sogndal vann 3-1 eftir hálvleiksstøðuna 1-1. Hødd kom annars væl frá byrjan. Í 4. minutti fingu teir brotsspark, sum Joachim Magnussen setti í netið. Men tá hálvur tími var leiktur javnaði Kai Risholt fyri Sogndal. Í 2. hálvleiki skoraði Kai Risholt aftur mál fyri Sogndal. Triðja málið hjá Sogndal skoraði Daniel Lubieniecki. Og nú stendur nógv á hjá Hødd og Rógva Jacobsen, sum hava verið stigaleysir í nógvum umførum síðstu tíðina.



*Meðan fuglfirðingar vunnu fyri triðju ferð á rað, var hetta triðja ferðin í fýra umførum, at KÍ einki fekk burturúr*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

ÍF-KÍ 1-0 (1-0):

# ÍF heldur fram í somu øði

*ÍF*

*KÍ*

**Hóast avrikið hjá fuglfirðingum hesa ferð ikki var nakað at reypa av, so var tað nóg mikið til at senda illa sperdu klaksvíkingarnar til hús við ongum**

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Fótbóltslagið er fínt í Fuglafirði, og tað er ikki at undrast á. Seinastu mongu árini hevur tað ikki verið á hvørjum ári, at ÍF nógvar ferðir upp í slag er farið av vøllinum við øllum stigunum, tá ið tað hevur verið í bestu deildini. Soleiðis er tað nú. 1-0 heimasigurin á KÍ var tann triði í trimum teimum seinastu dystunum.

Og tað var einki at siga til, at fuglfirðingar endaðu oman á í uppgerð, ið ikki fer í søgubøkurnar sum ein av teimum minnisríkastu. Tá ið munurin bara er eitt mál, so er tað sjálvandi spenningur og intensitetur í alla tíðina. Men tað eru málmøguleikar og mál og flótandi spæl, sum eru grundarlagið undir góðum fótbóltsundirhaldi, og sovorðið var lítið av í Fuglafirði leygardagin.

Málmøguleikarnir vóru ógvuliga fáir. Tilsaman kundu teir teljast á aðrari hondini. Klaksvíkingar høvdu tvær orduligar royndir ímóti málinum. Rodrigo sleit seg leysan í høgru í 1. hálvleiki, men málverjin bjargaði.

Tá ið miðvallarin Tórður Lervig í 2. hálvleiki royndi seg av brotsteigarmarkinum, sá tað spennandi út, men Andras Gango, sum er liðformaður og hevur ógvuliga stóran týdning fyri ÍF liðið, tveitti seg og bjargaði soleiðis, sum hann átti at gera.

ÍF hevði tríggjar vandamiklar møguleikar, og í tí eina førinum spurdist mál burturúr. Miðskeiðis í 1. hálvleiki sendi Knút Vesturtún, sum loysti Bartal Eliasen av í miðverjuni, har hann og Jonn Thomsen høvdu gott tak á, bóltin út í vinstru. Nenad Saric, ið mundi vera ein teirra, sum stóð sterkast í myndini, legði innfyri, og aftanfyri handara stólpan rakk Debes Danielsen bóltin. Hann sneiddi út frá baklinjuni, smekkaði flatt til, og bólturin sat í handara síðunetinum.

Næstu vandamiklu ÍF royndini syrgdu klaksvíkingar fyri. Ovi Nysted rakk ikki nóg langt upp eftir høgari frísparks framlegging, og bólturin fór upp um Jákup Mikkelsen og í tvørtræið.

Síðstu royndina átti innskifti Vincent Jacobsen, sum var púra leysur mitt fyri málinum, men Jákup Mikkelsen bjargaði væl.

Flótandi fótbóltsspæli var tað ikki so nógv av. Størsta partin av tí spælinum, sum var, vístu fuglfirðingar. Verjan hevði tak á tomu gestunum, Høgni Madsen og Fritleif í Lambanum høvdu ikki stórar trupulleikar av flestu av mótstøðumonnunum á sentrala miðvøllinum, síðuspælararnir megnaðu fleiri ferðir at bróta ígjøgnum og at leggja innfyri, Atli Petersen var raskur og arbeiðssamur, og Helgi L. Petersen tykist hava stóran týdning fyri ÍF liðið, hóast venjingarstøðan neyvan er tann, sum hon onkuntíð hevur verið.

Hjá KÍ var tað einki serligt. Rodrigo royndi ofta og nógv. Hann kundi kanska havt brúkt viðspælararnar meiri, enn hann gjørdi, men avbjóðingin var torfør og stór. Ov nógvir av teimum bláu vóru bóltflytarar, sum ikki bjóðaðu seg til og í staðin fyri viðhvørt at gera tað, sum tað ikki varð roknað við, fluttu bóltin og ofta sparkaðu.

Tað sigur ikki so lítið um støðuna, at superveteranurin Allan Joensen, sum í manningartrotinum var gravaður fram, saman við verjuspælaranum Milic Curcic og Rodrigo var mest eyðsýndi klaksvíkingurin.

Meðan fuglfirðingar vunnu fyri triðju ferð á rað, var hetta triðja ferðin í fýra umførum, at KÍ einki fekk burturúr.

Summarsteðgurin kemur serliga væl við hjá klaksvíkingum, sum eftir hvíldina í nakrar dagar mugu brynja seg til avbjóðingina, sum í heyst verður at ansa eftir, at tað ikki verður ov nógvur leygardagsfótbóltur næsta kappingarár.

Hjá ÍF skal tað í heyst ganga verri enn illa, um teir ikki eisini næsta ár fara at verða partur av bestu deildini.

## Endarnir ikki góðir

KÍ venjarin, Eyðun Klakstein, var sjálvandi ikki nøgdur við, at hansara lið leygardagin hevði tapt 1-0 í Fuglafirði.

- Vit kunnu ikki brúka tað til nakað sum helst, at vit manglaðu fleiri av teimum, sum plagar at vera fastir menn á besta liðnum. Teir, sum fingu møguleikan, vístu góðan hugburð, og tað skulu teir hava rós fyri. Vit kundu tað sama havt skorað, sum teir gjørdu tað, men teir vunnu, og vit mugu staðfesta, at vit høvdu stórar trupulleikar at spæla okkum til upplagdar møguleikar, sigur KÍ venjarin.

Tá ið Eyðun Klakstein verður spurdur, um tað kann hugsast, at KÍ fer at leita sær styrk til eftir summarsteðgin, svarar hann soleiðis:

- Flytingarvindeygað er framvegis opið, og so leingi, sum tað er møguleiki fyri at keypa og selja, eru allir møguleikar opnir.

Eyðun Klakstein vísir á, at endarnir ikki hava verið góðir hjá KÍ:

- Vit taptu tríggjar tær fyrstu ferðirnar í vár. Síðani spældu vit nógvar dystir uttan at tapa. Men nú hevur tað aftur hilnast einki serligt. Nú hava vit frí í nakrar dagar, og so fara vit at herja á aftur við nýggjari megi. Spælararnir eru framvegis amatørar, og teir treingja til hvíld.

## Málið framvegis tað sama

Fuglfirðingar eru væl nøgdir, nú teir halda summarfrí. Tað sigur Debes Danielsen, sum var einsamallur málskjútti, tá ið ÍF leygardagin vann 1-0 á KÍ:

- Tá ið vit fóru undir fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið, vóru vit akkurát fluttir upp í bestu deildina. Málið var at varðveita sessin í Formula deildini. Higartil hevur tað gingið væl. Sjálvandi er málið at sleppa so langt upp, sum tað ber til, og tað er tað, sum vit stríðast fyri. Men vit fegnast framvegis yvir, at tað higartil hevur gingið so mikið væl, at sannlíkið ikki er so lítið fyri, at tað skal bera til at varðveita plássið í Formula deildini, staðfestir Debes Danielsen.

Debes hevur áður spælt við NSÍ, og nú eru teir tríggir fyrrverandi NSÍ spælarar í Fuglafirði. Fyri stuttum er Helgi L. Petersen fluttur til Fuglafirðar at spæla, og leygarkvøldið varð greitt, at Andy Olsen eisini fer at spæla við ÍF.